Føroya Arbeiðsgevarafelag:

# – Kjartan slóðaði fyri at altjóðagera føroyskt vinnulív

**- Hann hevur samstarva nógv við vinnufeløgini, og var í fleiri ár eitt slag av bindiliði millum feløgini og tað almenna. Hann hevur við støðufesti roynt at ávirka okkara vinnukarmar og ta kós, sum føroysku fyritøkurnar halda, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum takkar Kjartani Kristiansen fyri tíðina, hann var stjóri á Menningarstovuni**

MENNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kjartan Kristiansen er maðurin, sum á mangan hátt hevur sæð møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi úr øðrum sjónarhorni enn fjøldin annars. Stundum hevur hann havt greinar í bløðunum og úttalilsir í loftmiðlunum. Tað hevur altíð verið forvitnisligt at lesa og hoyra tað, hann sigur, og mangur man hava hildið, at hann viðhvørt "fleyg" yvir okkum øðrum.

Hugsunarhátturin hevur verið meira ótraditionellur enn hjá teimum flestu, og maðurin hevur ongantíð lagt fingrarnar ímillum, men hevur sagt sína hjartans meining um tingini – á sín sermerkta hátt.

Í samrøðu við Sosialin í gjár, sigur Kjartan Kristiansen, nú hann gevst sum stjóri á Menningarstovuni, at framburðurin í samfelagnum sprettur ikki úr løgtingi og landsstýri – ei heldur úr vinnumálaráðnum, men úr sjálvari vinnuni og úr ágrýtnum og hugagóðum einstaklingum, ið finna saman um felags mál.

### Hevur gjørt mun

Í grein á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum veitir Føroya Arbeiðsgevarafelag Kjartani tøkk fyri sítt virksemi, vinnuni at fram øll hesi tjúgu árini, hann hevur verið stjóri á Menningarstovuni.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag er av teirri greiðu fatan, at Kjartan hevur gjørt mun. Hann hevur samstarva nógv við vinnufeløgini og var í fleiri ár eitt slag av bindiliði millum feløgini og tað almenna. Hann hevur við støðufesti roynt at ávirka okkara vinnukarmar og ta kós, sum føroysku fyritøkurnar halda.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at Kjartan hevði ein stóran leiklut, tá týdningarmikli handilssáttmálin við ES varð gjørdur, og í seinna helmingi av nítiárunum var hann ein av høvuðskreftunum aftanfyri orða fyrsta føroyska vinnupolitikkin.

- Hesin vinnupolitikkur legði eina greiða kós burtur úr studningsvinnuni. Hann setti skilnað millum alment og privat og legði dent á burðardygt vinnulív.

Felagið heldur lítlan iva vera um, at hesin vinnupolitikkur í fleiri ár virkaði sum eitt slag av "ferðslureglu", sum vísti politisku skipanini á røttu kósina.

### Altjóðagerðin

- Eitt annað, sum Kjartan Kristiansen hevur lagt nógva orku í, er at fáa føroysku fyritøkurnar út á altjóða leikvøllin. Hann hevur rikið og drigið fyritøkur at luttaka á messum og sølustevnum – fiskivinnumessum, oljumessum og hevur verið viðvirkandi til økt samstarv við eitt nú Ísland og Rusland.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at seinastu árini eru stórar broytingar hendar, samstundis sum føroyskar fyritøkur eru vorðnar alt meira virknar uttanlands.

- Vit siga ikki, at Kjartan hevur alla æruna av hesum, men hansara virksemi at altjóðagera okkara vinnulív, kann ikki undirmetast, heldur felagið, sum ynskir at takka Kjartani Kristiansen fyri gott samstarv, fyri hjálpsemi og fyri at vera hollur í ráðum.

At enda ynskir felagið, at samstarvið fer at halda fram, nú menningarstjórin seinastu 20 árini fer í starv í vinnumálaráðnum.



*- Hann hevði ein stóran leiklut, tá týdningarmikli handilssáttmálin við ES varð gjørdur, og í seinna helmingi av nítiárunum var hann ein av høvuðskreftunum aftanfyri at orða fyrsta føroyska vinnupolitikkin, sum legði eina greiða kós burtur úr studningsvinnuni til burðardygt vinnulív, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag*

## Føroyar marknaðarføra nýggja cruise rutu

Nú sum Norðuratlantshavið gerst alt meira áhugavert í cruise-høpi, eru Føroyar vorðnar liður í marknaðarføring av nýggjari cruise-rutu

Á cruiseskipastevnu í Miami herfyri varð gjørd ein samstarvsavtala um felags marknaðarføring av sigling í Norðuratlantshavi. Í samstarvinum eru Orknoyggjar, Føroyar, Ísland, Grønland og Ný Foundland.

Á stevnuni varð eitt skjal undirskrivað av umboðum fyri hesi fimm oyggjasamfeløgini, har tey vátta at samstarva um at fáa fleiri skip til økið. Tað er cruise-vinnan í Ný Foundlandi og Labrador, sum hevur tikið stig til samstarvið, í eini roynd at fáa fleiri ferðamannaskip hagar.

Vegna Føroyar skrivaði havnarnevndarformaðurin í Havn, Leivur Hansen, undir skjalið. Tórshavnar havn hevur verið umboðað á Seatrade Cruise Shipping Convention í Miami síðani 1994.

Hetta var 23. stevnan av sínum slagi, har umboð fyri cruiseskipahavnir, umboðsfeløg og fyriskiparar av útferðum hitta umboð fyri reiðarí hjá ferðamannaskipum.

Umframt Tórshavnar havn vóru Faroe Ship, Tor Shipping, Green Gate Incoming og MB-Tours við á stevnuni hesaferð.

Væntandi vitja 45 ferðamannaskip við tilsamans 35.000 ferðafólkum á Havnini í summar. Hetta er met. Í fjør vitjaðu 41 skip við 24.000 ferðafólkum.



*Cruise skip á Havnini*

# EasyFisk leggur um til partafelag

**Tað hevur nú eydnast brøðrunum, Sammy og Stig Isaksen, sum løgdu lunnar undir fyritøkuna, EasyFisk, at finna rætta íleggjaran, sum bæði vil skjóta pening í felagið og vil luttaka aktivt í dagliga arbeiðnum. Íleggjarin er Hans Petur Ellingsgaard í Saltangará**

EASYFISK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í februar høvdu vit grein í Sosialinum um, at føroyska fyritøkan í Danmark, EasyFisk, eftir bílegging um heimasíðu og telefon selir føroyskan fisk í Danmark.

Vit hava áður skrivað um hesa fyritøku, sum brøðurnir, Sammy og Stig Isaksen, hava lagt lunnar undir.

Greinin í februar snúði seg serliga um, at EasyFisk tá leitaði eftir føroyskum íleggjarum, so fyritøkan fekk høvi at veksa um sítt virksemi.

### Stórur áhugi

Brøðurnir siga nú, at fleiri føroyingar, sum høvdu áhuga í at seta pening í virksemið, settu seg í samband við teir báðar.

- Vit hava tó lagt dent á, at vit helst vilja hava ein íleggjara, sum sjálvur eisini kann luttaka aktivt í rakstrinum.

Teir báðir siga, at tað nú hevur eydnast at finna rætta íleggjaran, sum bæði vil skjóta pening í felagið og vil luttaka aktivt í dagliga arbeiðnum.

Úrslitið er, at EasyFisk frá 1. apríl er lagt um til partafelag vid trimum eigarum, sum nú eru Hans P. Ellingsgaard, Stig Isaksen og Sammi Isaksen. Hesir manna eisini nýggju nevndina í felagnum.

### Størri úrval

- Í sambandi við umleggingina hava vit eisini valt at víðka um vøruúrvalið. Aftrat vanligu vørunum, sum vit higartil hava havt, er nú eisini ræstur fiskur og føroyskur alilaksur at fáa. Vit ætla so við og við at fáa uppaftur fleiri vørur at selja, siga Sammy og Stig.




*Termo-posarnir tryggja, at vøran er fryst í fleiri tímar, hóast hon ikki kemur í frystiboksina beinanvegin. Hetta er serliga praktisk fyri okkara privatu viðskiftafólk, sum ofta fáa sína bílegging út á arbeiðsplássini, sigur EasyFisk*

EasyFisk hevur nú eisini valt at levera í smærri eindum framyvir fyri at ganga ynskjunum hjá húsarhaldum, har ikki so nógv fólk eru, á møti.

- Hetta merkir, at allur fiskur nú er pakkaður í 1000 g posar. Tó er laksur, raspað flak og ræstur fiskur pakkaður í minni eindir.

### Termo-posi

Ein onnur broyting verður, at í stadin fyri sum higartil at levera posarnar í einum pappkassa, hevur felagið nú fingið sínar egnu termoposar.

- Termo-posarnir tryggja, at vøran er fryst í fleiri tímar, hóast hon ikki kemur í frystiboksina beinanvegin. Hetta er serliga praktisk fyri okkara privatu viðskiftafólk, sum ofta fáa sína bílegging út á arbeiðsplássini.

Fyritøkan sigur, at teir ikki minst ætla sær at røkja privat viðskiftafólk, sum starvast ymsastaðni í Danmark, og á henda hátt væntar EasyFisk, at uppaftur fleiri viðskiftafólk fara at leggjast aftrat.

### Royndarár

- Fyrsta árið hjá EasyFisk hevur verið eitt royndarár, og vit báðir, sum byrjaðu fyritøkuna, hava havt okkara høvuðsarbeiði í aðrari vinnu. Tí hevur okkara leiklutur í felagnum higartil verið ógvuliga avmarkaður.

Sosialurin kann leggja aftrat, at Sammy starvast innan KT og Stig er skipari.

Nú kemur so eisini tann broyting í, at tvey starvsfólk fara at arbeiða fulla tíð hjá EasyFisk og verða málini, sum felagið nú hevur sett sær fyri 2007, rokkin, er hugsandi, at enn fleiri fólk koma at arbeiða í fyritøkuni sum frá líður.

### Marknaðarføring

- Eitt av málunum hjá okkum fyri 2007 er eitt nú at sláa EasyFisk fast sum ein "brand" í Danmark. Størsti parturin av peninginum, sum felagið nú hevur fingið, verður tí nýttur til marknaðarføring, siga stigtakararnir til fyritøkuna, Sammy og Stig Isaksen.